## Áfast millum mann og konu

Leygarnáttina var húsaófriður í Eysturoynni. Orsøkin var, at maður og kona ikki trivust undir somu lon. Úrslitið varð, at konan rýmdi út, og so var friður, sigur løgreglan. Aðrir húsaófriðir vóru eisini um vikuskiftið. Hinir tilburðirnir vóru í Havn, og tá var talan um fólk, ið ikki høvdu tað nóg stuttligt til veitslur og tískil blivu ógjørlig at hava verandi. Í teimum førunum avgjørdi løgreglan at koyra fólkini til hús, tí veðrið var so ófantaligt, at tað hevði verið keðiligt at slept fólkunum út í kuldan.

## Deyðadømdir hvalir í Kanada

Tað kemur meira enn so fyri, at hvalir frysta inni í ísi, so teir ikki sleppa burtur aftur og doyggja. Ein føroyskur skipari, sum siglir við kanadiskum trolara, hevur umvegis eina av okkara keldum lati okkum frætta, at júst hetta hendi har yviri nú um dagarnar. - Hesir hvalirnir hava verið ov seinir at sleppa sær burtur, áðrenn havið sunnanfyri teir frysti. Nú er planurin at royna at gera av við teir. Skiparin heldur fyri, at hevði Greenpeace vitað, men so leggur hann aftrat. - Her er ikki nógv at gera, tí hvalirnir klára ikki at sleppa útaftur á lívi kortini. Sum skilst úr Kanada, eru hvalir frystir inni í fleiri slíkum holum í ísinum, sum hesari, vit síggja á myndini. Hvalirnir noyðast upp at anda við jøvnum millumbilum, og hugsandi er, at hetta er ikki so lætt, tá talan er um ein heilan grindabólk, sum bert hevur eitt so lítið hol at savnast í.

# púrasta svakan



*Við bátinum La Mondiale ætlar Livar S. Nysted at seta heimsmet í at rógva tvørtur um Atlantshavið. Báturin er væl útgjørdur til ferðina, og gongur alt eftir vild kunnu teir taka seinastu tøkini til Barbados seinast í januar mánaði komandi ár*

tá saman um kemur og tá tað fer at standa á hjá monnum, er tað henda styrkin sum skal takast fram og brúkast teir seinastu fjórðingarnar á mál í Barbados.

Hvussu hevur Livar so fyrireikað seg til henda partin av ferðini? Livar er skjótur at svara:

- Sohvørt sum eg eri komin í betri og betri venjing, havi eg líkasum sæð ferðina fyri mær í mínum innara eyga. Og skal eg vera heilt erligur, so er longu langt síðani at eg byrjaði at njóta túrin.

- Tað er kortini hopleyst at siga, hvussu túrurin fer at verða. Men tað ræður um at hugsa um allar hugsandi trupulleikar, tí hetta verður ein harður túrur. Eingin ivi um tað, slær ungi sundamaðurin fast.

### Ítøkiligar ynskidreymar

Tann, sum tosar við Livar S. Nysted, skal ikki hava hoyrt hann tosa rættiliga leingi, fyrrenn ein skilir at hann brennur fyri tí, sum hann ger.

Aftrat stóra áhuga sínum fyri hesi ferðini, er hann eisini væl bygdur kropsliga og førur fyri at taka við stórum og langligum – og kanska eisini monotonum – avbjóðingum.

Í nógv ár høvdu hann og ein vinmaður hansara, Fróði Waag úr Klaksvík tosað um at rógva tvørtur um Atlantshavið. Hetta vóru ikki bert ynskidreymar, men teir arbeiddu heilt ítøkiliga við eini slíkari ætlan.

Teir vóru báðir við »Havrenningi«, sum setti á at rógva millum Klaksvík og Hetlands fyri trimum árum síðani, men høvdu kortini sett sær eitt størri mál fyri. Fyri Fróða verður henda ætlanin ikki veruleiki, tí hann í løtuni arbeiðir innan flogferðslu í arabiska landinum Qatar.

### Áratøk til veruleika

Men Livar er hinvegin púra sannførdur um, at hann ætlar at gera áratøk til veruleika – at rógva seg fram til eitt met í havrógving.

Hann gjørdi ikki mætari, enn at seta seg væl til rættis frammanfyri telduna og síðani leita á alskyns heimasíðum eftir onkrum øðrum rógvarum, sum gingu við somu hugsan sum hann um havrógving.

Hepnið var við honum. Hann kom fyrr í vár fram á nakrar menn úr Onglandi, sum vóru í ferð við at fyrireika júst somu ætlan sum hann hevði havt. Livar gjørdi ikki mætari enn at seta seg í samband við teir umvegis teldupost.

- Eg fekk svar aftur frá teimum beinanvegin. Teir vóru áhugaðir at hitta meg, fyri at hoyra nærri um mínar ætlanir um ferðina.

- Vit prátaðu saman um hetta, og avgjørt var at eg skuldi gerast ein partur av hesi spennandi ferðini, greiðir Livar íðin frá.

Hetta ídnið hansara helt fram við hørðum venjingum frá fyrsta degi av. Herfyri var hann á sera harðari venjingarlegu í Skotlandi saman við hinum rógvarunum, eins og greitt varð frá í Sosialinum næstseinasta vikuskifti.

### Stórur áhugi

Ætlanin er, at teir skulu leggja til brots úr Kanarisku Oyggjunum á nýggjárinum.

Júst, hvat Livar fer at brúka ferðina til, dugir hann ikki heilt at siga enn. Úrslitið kann gerast ein bók, eins og gjørt varð, tá Tróndur Patursson á sinni ferðast við húðabátinum »Brendan« úr Onglandi, umvegis Føroyar, Ísland og Grønland til Norðuramerika.

Hinvegin væntar Livar sær so mikið nógvar upplivingar á ferðini, at tað fer uttan iva at verða nóg mikið tilfar til fleiri fyrilestrar.

- Mær hevur í øllum førum dámað sera væl at hoyra um slíkt brøgd. Og eg ivist ikki í, at tað er mong onnur sum hava sama áhuga sum eg – serliga tey sum rógva kapp.

- So eg vænti, at nógv fara at fylgja við ferðini.

### FAKTA

**Tíðarætlan hjá Livar S. Nysted**

**Hálvan desember:** Fer úr Hvannasundi til Kanarisku Oyggjarnar

**Fram til nýggjárs:** Rigga bátin til og gera seinastu fyrireikingarnar. Út at royna bátin

**Nýggjársaftan:** Lagt verður til brots úr Kanarisku Oyggjunum

**30 dagar seinni – vónandi:** Eitt heimsmet er sett, tá tikin verða seinastu tøkini við Barbados

## Dreymur um tað ógjørda

Tá tað frættist um ætlanina hjá Livari og hinum á »La Mondiale«, byrjaðu fólk beinanvegin at tosa saman um hetta.

Úttalilsini vóru mong í hesum sambandi Summi hildu hann vera púra øran at útseta seg fyri slíkt á hávetri við stormi og vánaligum líkindum. Onnur ynsktu honum góða ferð og vónaðu at teir fóru at koma á mál.

Støðan er jú hon, at á tí breiddarstiginum teir seta kós, er vanliga gott veður í januar mánaði. Teir hava í øllum førum streymin við sær, og vóna eisini at vindurin verður teimum til vildar allan tann 3050 fjórðingar langa teinin um havið.

Hann fekk haraftrat fleiri ferðir tann viðkomandi spurningin, hví í víðu verð hann yvirhøvur vildi útseta seg sjálvan, konuna og børnini fyri slíkari vandamiklari avbjóðing.

- Hatta er tann stóri og ikki minst, tann góði spurningurin. Tað er ringt at geva eitt stutt svar uppá handa spurningin, men tað hevur nakað við at útfordra meg sjálvan ... og ja, eisini hetta við at leita eftir spenningi, greiðir hann frá.

- Eg havi altíð havt ein dreym um at gera nakað, sum eingin annar hevur gjørt!

Saman við áðurnevnda, Fróða Waag tosaðu teir fyrst um at rógva til Hetlands, men síðani mentist henda hugsanin til eisini at umfata havrógving úr Kanarisku Oyggjunum og allan vegin tvørtur um Atlantshavið til Barbados.

Sum ein part av fyrireikingum sínum hevur Livar lisið eina bók um tveir norðmenn, sum róðu sama teinin seinast í 1800-talinum.

- Hetta var ein ótrúliga spennandi bók, skal eg siga tær. Hon gav mær av sonnum blóð á tonnina og ein øgiliga hug at gera tað sama sum teir!

**Nýtt teoriskeið**

Nýtt teoriskeið byrjar hósdagin 27. nov. kl. 17

*– avgreitt skjótt og gott!*

Eisini byrjar R/F skeið fyri tey, sum hava mist koyrikortið fyri rúsdrekkakoyring.

KOYRISKÚLI FØROYA

Stanley A. Olsen tel. 211099
Niels Petur Olsen tel. 223041
Brekkugøta 8 · 100 Tórshavn